# Tiltøk

**Gudstænastur sunnudagin**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Sonja Klein, altarg., skriftamál kl. 10.40. Talvan gongur fyri KFUK í Havn
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11
Jógvan Fríðriksson, biskupur. Talvan gongur fyri KFUK í Havn. Sunnudagskúli er undir gudstænastuni
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Heri Joensen. Sunnudagsskúli er undir gudst. Talvan gongur fyri Kirkjuligu Heimamissiónina
**Argja kirkja:** kl. 11
Derhard Jógvansson. Sunnudagsskúli er undir gudst. Talvan gongur fyri Kirkjuligu Heimamissiónina
**Nólsoyar kirkja:** kl. 11.40
Skriftarmál.
Kl. 12 gudstænasta við altarg., Sverri Steinhólm
**Kvívík:** kl. 12
Inga Poulsen Dam
**Gøta:** kl. 12
Martin R. Jacobsen, altarg. Talvan gongur fyri Heimamissiónina
**Gjógv:** kl. 12
Emil Olsen, messa. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Kirkjuligu Heimamissiónina
**Bøur:** kl. 11
David Johannesen. Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Heimamissiónina
**Christianskirkjan:** kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen. Talvan gongur til frama fyri Kirkjuligu heimamissiónina
**Rituvíkar kirkju:** kl. 11
Meinhard Bjartalíð
**Glyvra kirkja:** kl. 11
lestur og sunnudagsskúli
**Tvøroyrar kirkja:** kl. 11
Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Heimamissiónina.
**Hvalbiar kirkja:** kl. 12.30
Jónsvein Bech, altarg. Talvan gongur fyri Heimamissiónina
**Skopun:** kl. 12
Jákup R. Hansen, altarg. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Kirkjuliga Heimamissiónina
**Svínoy:** kl. 12
Elsa Funding, altarg. Talvan gongur í Norðoya Eystara prestagjaldi fyri kirkjuligu Heimamissiónina
**Saksunar kirkja:** kl. 11
Bergtórur H. Bjarkhamar, altarg.

**Andaktir 27. febr.**
**Klaksvíkar sjúkrahús:** kl. 10
Magnus Brahé Jørgensen
**Norðoya røktarheim:** kl. 14.30
Magnus Brahé Jørgensen

**Adventistakirkjan**
Leygardagin kl. 10 Bíbliugrannsking við Jónas Johnsson
Kl. 11 Gudst. við Allan Falk.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 7.30 messa í Kerit
Sunnudag kl. 11 hámessa v/Alren Soosaipilai, prestur í Mariukirkjuni. Sunnudagsskúli kl. 14. Tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum verður í Mariukirkjuni millum kl. 15 og 18.
Hóskvøldið verður Taizé-kvøld í Kerit kl. 20. Øll eru vælkomin.
Fríggjakvøldið 4. mars verður Altjóða Kvinnubønardagur í Oasan kl. 19.30, har allar kvinnur kunnu vera við.

**Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Sunnudagur kl. 11 Sunnudagsskúli í kirkjutíð. Kl. 18 Møti við Kajberg Davidsen, Skála.
Mánakvøldið kl. 20 Sjómanskvinnuringurin kemur saman.

**Hebron á Argjum**
Fríggjadagin kl. 10 Bønarløta fyri kvinnur og menn.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Kl. 12 Sunnudagsskúli í salinum niðriundir. Kl. 12 Møti. Evni: OM - Møguleikar innan missión. Anita Tausen, Høgni Johannesen og Ruth Gaardlykke greiða frá
Kl. 20 Ungdómsbólkur.

**Fríkirkjan Oasan**
Fríggjakvøldið kl. 20 After8.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Ungdómsbólkinum "offurgongd verður",
kl. 12 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti
Verið hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin Tórshavn Tórsgøta 19**
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti Finnbogi Olsen talar.
Kl. 11 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Palli Petersen tala.
Tlf. 583023 – 581343.

**Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin

**Lívdin í skúlanum við Løgmannabreyt**
Leygarkvøldið ALIVE - ungdómsmøti kl. 21
Sunnudagin Familju- og tilbiðjanarmøtið byrjar kl. 10.30 og lovsongur og tala kl. 12. Á familjumøtinum hevur Ignite eitt kreativt innslag. Á seinna møtinum sum byrjar kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um "Rómbrævið 15:8-13 Heidningalovsongur." Meðan seinna møtið er kl. 12 verður barnaansing, sunnudagsskúli og UngLív. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Atla Rasmussen.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Róland í Skorini talar og ung luttaka við sangi. Barnaansing í Lítla Sali.
Kl. 12 Sunnudagsskúli.
Kl. 13 Felagsmáltíð. Les meira á heimasíðuni. Kl. 18 Sangmøti. Barnaansing í Barnarúminum.

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Fríggjakvøldið Kongsins Herlið. Møti fyri børn frá 8 ár og uppeftir. Øll børn verða koyrd heim eftir møtið. Verið hjartaliga vælkomin. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/ sunnudagskúla.

Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Jaspur Langaard. Blakrosmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagur 27. febr. kl. 15 í KFUK: Aðalfundur.
Mánadagur 28. febr. kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman við Niels Paula Danielsen presti. Evni: Onnur trúargein.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl 11 Familju og morgunmøtið, UV-night kl. 19

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia Tórshavn**
Fríggjakvøldið kl. 20 Mammur hittast til bøn. Kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Kl. 13.15 Sundagskool.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 møti við Sólrun og Per Poulsen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/ Tummas og Irenu Jacobsen sum tala og syngja. Innsavnan til húsið.

**Filadelfia Vágar**
Sunnudagin kl. 11 møti við Vinjard Magnussen, Kl. 11.30 sunnudagsskúli.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvági**
Sunnudagin luttaka Theodor Petersen og døturnar við talu og sangi.

**Miðvágs Missiónshús**
Sjómanskvinnuringarnir í Sørvági, Sandavági og Miðvági koma saman í Missiónshúsinum mikukvøldið kl. 20. Burturluting verður og Torleif Johannesen verður við. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Leynar**
møti verður í skúlanum sunnukvøldið kl. 18 við Regin Høgnesen. Sangur við Hjørleif Gaard. Øll eru vælkomin.

**Saron Vestmanna**
Fríggjakvøldið kl. 19 Møti við Jens Peder Pedersen.
Leygarkvøldið kl. 19 Møti við Jens Peder Pedersen.
Sunnudagin kl. 11 Møti við Jens Peder Pedersen. Kl. 18 Møti við Jens Peder Pedersen
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 verður Familjumøti har Henry Johannesen úr Klaksvík verður við. Nátturði verður aftaná Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið verður juniorhugni fyri ung frá 5. klassa og uppeftir.
Týskvøldið verður bønarløta kl. 19.30 og bíbiltími kl. 20 v/ Frants Jensen. Verið vælkomin

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 verður sunnudagskúli. Kl. 18 møti við Kristian á Reynatrøð, Anita og Pól Súni syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 20 verður ungdómsmøti.

**Keldan Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake XL
Sunnudagin kl. 17 Evangeliskt møti við Osbjørn og Ólavur. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 19 juniormøti
Leygarkvøldið onki ungdómsmøti, vegna felagsungdómsmøti í Gøtu kl. 20. Bilar koyra frá meinigheitshúsinum kl. 19.30
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti við Petur Johannesen. Barnaansing.
Øll hjartaliga vælkomin
Sjómanskvinnuringur kemur saman mikukvøldið kl. 19.30.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadag kl. 21 Ungdómsmøti
Sunnudag kl. 17 Felagsmøti við Sigrun og Leo Hans Mikkelsen og ung luttaka við sangi og drama. Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091.

**Missiónsviku í Gøtu**
*22. februar - 27. februar*
Møtini verða í kirkjukjallaranum.
Fríggjakvøldið kl. 20 Torleif Johannesen talar KFUM & K kórið úr Klaksvík syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 Ung skipa fyri. Reimund Langgaard talar. Ungdómskórið Gleez syngur.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta v/ altarg. Martin Restorff Jacobsen. Sunnudagsskúli verður í kirkjukjallaranum.
Kl. 18 Pól Johannesen talar. Bethaniakórið syngur.
Innsavnan til nýtt missónshús. Drekka er eftir hvørt møti.
Hvørt kvøld er bønarløta ein hálvan tíma áðrenn møti.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting.
Týskvøldið kl. 20
Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin er onki møti vegna missiónsviku í Gøtu.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti – Orðið frítt.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti v/ Jórun Gardar Bringsberg
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Óla Steinberg. Barnamøti er samstundis
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/ breyðbróting.

**KFUM og K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta.
Kl. 18 Familjumøti.
Kl. 21 Ungdómsmøti.
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti við Mariu Mørkøre.

**Hannasunds skúla**
Sunnukvøldið kl. 18 møti í við Justinus Poulsen. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Hvørt týskvøld kl. 20 er bønarmøti.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Sunnudagin verður einki møti vegna missiónsviku í Hvalba.

**Frelsunarherurin Vágur**
Fríggjadagin kl. 9.30 orði á borði.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti/sunnudagsskúli.
Kl. 18 sang og vitnimøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta.

**Bethel, Vágur**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin

**Missiónshúsið í Hvalba**
Fríggjakvøldið kl. 20 møti við Jógvan Højgaard.
Leygardagin kl. 15 Barna- og familjumøti v/Jógvan Højgaard.
Kl. 20 møti við: Sigfred Johannesen og Hans Paula Højgaard. Sumbiarkórið syngur. Innsavnan verður til húsið.
Sunnudagin kl. 12.30 gudstænasta v/altarg. v/Jónsvein Bech, presti. Kl. 18 møti við Hans Paula Højgaard og Sigfred Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag-hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
**Týsdagin 1. mars** kl. 15 verður áhugavert tiltak í Tilhaldinum. Hans Holm, landafrøðingur fer at kunna um núverandi støðuna í Miðeystri. Øll eru vælkomin.
**Tilhaldið verður 13 ár 12. mars.** Føðingardagur verður mánadagin 14. mars. Somuleiðis verður nevndarval mánadagin 14. mars. Tveir nevndarlimir standa fyri vali (Katrin Dahl og Eilif Samuelsen). Uppskot til nevndarvalið skulu leggjast í postkassan í gongini.
Mánadagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er røgvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Enskt talumál í køkinum á 1. hædd.
Kl. 14-16 Telduskeið grundskeið byrjar. Páll Poulsen Tilmelding: 316491. Øll eru vælkomin.
Kl. 15 **OBS!!** Nýtt tiltak í Tilhaldinum. Halgir og Ása W. Poulsen læra okkum at scrabbla. Scrabblespælið kom á føroyskum til jóla 2010. Øll eru vælkomin.
Týsdagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 10 Sangur. Simme Jacobsen. Sangurin verður á Lágargarði. Øll eru vælkomin.
Kl. 11-13 Víðkað telduskeið.
Kl. 14-16 Víðkað telduskeið, Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
Kl. 15 Prát. Øll eru vælkomin.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Vit hittast í Losjuni. Føstulávintshugni og føroyskur dansur verður í Losjuni mikukvøldið 2. mars kl. 19.

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
lýsir til aðalfund í hølum felagsins týskvøldið 1. mars kl. 19.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Calarasi Missiónin**
Hjálp okkum at geva svongum børnum í Romenien eina heita máltíð um dagin. Konto í Eik: 9181 4252669
Bank Nordic: 6460 1618549
Takk fyri tín stuðul.

**Samuelskirkjan**
Frìggjakvøldsdøgurði í Samuelskirkjuni. Fríggjakvøldið 4. mars kl. 18.30 verður hugnaløta í Samuelskirkjuni á Thorsgade 65. Til matna er Kalvafisk, kaffi og desert. Kostnaður 110 kr. Hans J. Hermanson fer at hugleiða um Grindina í Føroyum. Hevur tú hug at vera við, skalt tú ringja til Hervør á tel. 36498402 ella til Sigrid á tel. 42247282 innan mikudagin 2. mars.
Komandi tiltak verður 3 apríl.
Til matna verður Rast kjøt.
Tað er guðstænastur:
20. mars kl. 14 - 3. apríl kl. 14
17. apríl kl. 14 - 24. apríl kl. 14
1. mei kl. 14 - 15. mei kl. 14
5. juni kl. 14 - 19. juni kl. 14.

**Landsfelag Pensjónista**
*Tróndargøta 13, Tórshavn*
Tlf. 319394 og 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará. Opið er mánadag til hósdag*